# ítróttur

Nr. 125 • hósdagur • 4. juli 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fara at súkkla Sjælland Rundt

**Føroyingarnir vóna, at teir vera hepnari við punkteringunum í ár, enn fyri tveimum árum síðani.**

SÚKKLING
*Páll Holm Johannesen*




*Teinurin, sum føroysku súkklarnir, skulu súkkla um vikuskiftið*

Átta føroyskir súkklarar fara um vikuskiftið at royna seg í súkklukappingini Sjælland Rundt. Ongir oyggjaleikir eru í ár, og tí hava súkklarnir valt at leita sær eftir øðrum avbjóðingum, og tað er soleiðis danmarkartúrurin er komin í lag. Føroysku súkklarnir hava einaferð áður verið í kappingini Sjælland Rundt, tað var fyri tveimum árum síðani. Teinurin verður 292 km, og tað er í súkklumáti rættiliga langt. Longsti teinurin í eitt nú Statoil Kring Føroyar er um 120 km, so við tí mátistokkinum verður talan um eina rættiliga drúgva kapping hjá føroysku súkklarnum.

Kappingin er skipað sum motiónssúkkling, har tað fyrst og fremst ræður um at gjøgnumføra teir 292 kilometrarnar. Sjálvt um tað eisini verður súkkla uppá tíð, kemur hetta ikki fyrr enn í aðru røð. Væntast kann, at einir 10-12 tímar verða brúktir uppá teinin, og verða steðgirnir til drekka og mat lagdir aftrat, koma súkklarnir at brúka einir 12-14 tímar. Súkkla verður frá Køge og málið er eisini í Køge.

Kappingin byrjar klokkan seks leygarmorgunin, og tíðliga leygarkvøldið skuldu fyrstu súkklarnir verði komnir á mál í Køge.

### Skulu bara gjøgnumfora

Seinast føroyingarnir luttóku í Sjælland Rundt, vórðu teir illa raktir av punkteringum. Lendið, teir súkkla á, líkist ikki tí í Føroyum, og tí hava súkklarnir fyrireikað seg væl ímóti punkteringunum í ár. Súkklarnir siga, at tað er serliga sandurin, ið legst á vegirnar, sum fer illa við dekkunum. Hesaferð hava súkklarnir fingið sær onnur dekk, hesi eru av gummi, og tí vóna súkklarnir at fáa bilbugt við punkteringarnar í ár. Onkur súkklari brúkti, fyri tveimum árum síðan, ein heilan tíma bara at lappa dekk. Annars er málið hjá føroyingunum at gjøgnumføra súkklukappingina, og tá teinurin er so drúgvur, verður tað ein kapping í sær sjálvum. – Tað er eitt sindur ilt at meta um frammanundan, hvussu vit fara at standa okkum, tí veðurlíkindini og vandin fyri punkteringum, kunnu altíð spæla okkum eitt puss, sigur ein av súkklarnum.

Føroysku súkklarnir eru vanir við at súkkla her heima í heilt smáum flokkum, og tí eru teir spentir til at royna í størri flokkum niðrið í Danmark.-Venjingina at súkkla í stórum flokki, fáa vit ikki her heima, og tað hevur víst seg at verið ein trupuleiki, tá vit hava verið á oyggjaleikunum, sigur ein av stigtakarunum til túrin, Evald Rasmussen.

Teir átta føroysku súkklarnir, ið fara at royna seg í Sjælland Rundt eru: Evald Rasmussen, Beinur Rasmussen, Eli Christiansen, Kári Simonsen, Jens Sigurd Simonsen, Robert Willhelmsen, Sverri Mohr Edvinson og Johan Brend

# Renning á Varmakeldu

**Tíðindaskriv**

Leygardagin 6. juli verður skipað fyri rennikapping á Varmakeldustevnuni í Fuglafirði.

Kappast verður í ymsum bólkum bæði hjá vaksnum og børnum. Startur og mál í øllum kappingum eru á havnalagnum við P/F Petur Larsen.

Kappingin byrjar kl. 13.00, tá vaksin renna 5 km. Runnið verður 5 ferðir runt eina leið, sum gongur frá P/F Petur Larsen, niðan á Bakkaveg, norður eftir Bakkavegi, oman aftur á havnalagið við Landingarhúsið, og síðan suður eftir havnalagnum til P/F Petur Larsen.

Hóast øll byrja í senn, fevnir kappingin um tveir aldursbólkar: vaksin fødd í 1984 ella fyrr, og vaksin fødd í 1956 ella fyrr (masters). Vinnandi maðurin og kvinnan fáa steyp, og nr. 2 og 3 fáa heiðursmerki. Nr. 1, 2 og 3 samanlagt í masters-bólkinum fáa heiðursmerki.

Hendan kappingin er samstundis fjórða umfarið í Grand Prix kappingini hjá teimum vaksnu. Undan kappingini liggur Bogi Lenvig á odda við 120 stigum, meðan Bogi Joensen og Guttorm Sørensen liggja javnir á øðrum plássi við 76 stigum. Hjá kvinnunum hava Rigmor N. Arge 120 stig, Sólfríð Fjalsbak 74 stig og Brindis R. Weihe 39 stig.

Børnini byrja kl. 13.30, tá dreingir -7 og gentur -7 (f.1995 ella seinni) renna 500 m. Síðani renna dreingir -10 og gentur -10 (f.1992-1994) sama tein. Runnið verður frá vegnum áraka P/F Petur Larsen og norður eftir kei'ini, har vent verður um eina keylu.

Tey størru børnini renna eftir somu leið, sum tey vaksnu. Tó verður bert runnin ein runda, sum er 1 km. Kappast verður í hesum bólkum: dreingir -13 og gentur -13 (f. 1989-1991) og dreingir -17 og gentur -17 (f. 1985-1988).

Nummar 1, 2 og 3 í øllum bólkum hjá gentum og dreingjum fáa heiðursmerki.

Tey, ið ætla sær at luttaka, skulu melda seg til við P/F Petur Larsen hálvan tíma, áðrenn kappingin byrjar.

**Kappast verður eftir hesi skrá:**

| Kl. | Aldursbólkur | Umfør | Teinur |
|---|---|---|---|
| 12.30 | Tilmelding við P/F Petur Larsen | | |
| 13.00 | Vaksin (fødd í 1984 ella fyrr) | 5 | 5 km |
| 13.30 | Dreingir -7/Gentur -7 (f.1995 ella seinni) | 1 | 500m |
| 13.40 | Dreingir -10/Gentur -10 (f.1992-1994) | 1 | 500m |
| 13.50 | Dreingir -13/Gentur -13 (f.1989-1991) | 1 | 1.000m |
| 14.00 | Dreingir -17/Gentur -17 (f.1985-1988) | 1 | 1.000m |
| 14.10 | Heiðursmerkjahandan | | |

## Svimjilandsliðið til Íslands



*Svinmilandsliðið, sum skal royna seg í Íslandi um vikuskiftið*

SVIMJING
*Páll Holm Johannesen*

Í gjáramorgunin fór føroyska svimjilandsliðið til Íslands at luttaka í svimjikapping. Talan er um Íslendska meistarskapið. Siður er, at fleiri gestasvimjarar úr ymiskum londum eru boðnir við, og í ár skulu so føroyskir svimjarir royna seg. Kappingin fer fram nú um vikuskiftið. Sum nakað nýtt, skulu føroysku svimjarnir svimja í einum uttandura svimjihyli og hyljarnir verða 50 metur til longdar.

Tey, ið skulu umboða Føroyar um vikuskiftið eru: Kristoffur Hentze HS, Jóannes á Fløtti HS, Andrass Thomsen HS, Aksal H. Norðfoss HS, Benthe S. Andersen TS, Elisabeth Rasmussen HS, Helga Djurhuus HS og Karina Petersen FS. Landsliðsvenjari er Petur Heðin av Fløtti.



# Julian aftur í B36



*Tilveran sum yrkisleikari verður eitt sindur einstáttað í longdini, men nú havi eg so roynt hetta í fimm ár, og eg havi fingið hópin av góðum minnum við mær, nú eg komið heimaftur, sigur Julian Johnsson millum annað*

**– Sjálvt um eg havi fingið lagt eitt sindur til síðis, so eri eg ikki vorðin nakar ríkur maður av hesum, sigur Julian Johnsson millum annað. Seinast í hesi vikuni vendir landsliðsmaðurin aftur til B36 og føroyskan fótbólt**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Julian Johnsson. Føroyski landsliðsleikarin, sum seinastu fimm árini hevur roynt seg sum yrkisleikara, flytir nú heimaftur til Føroya, har B36 verður nýggja felag hansara.

Hetta gjørdist veruleiki um døgurðaleitið týsdagin, tá Julian fekk grønt ljós frá leiðsluni í Hull at seta kós aftur móti heimlandinum.

### Gerst einstáttað

Um avgerðina, sum hann nú hevur tikið, sigur Julian, at hetta fyrst og fremst komst av, at hann nú kundi hugsað sær at koma heimaftur.

– Eg havi verið burturi síðani 1997, og hesa tíðina havi eg so spælt okkurt um 180 dystir við trimum ymsum feløgnum. Sjálvandi hevur tað verið stuttligt, men í longdini gerst hetta dekan ov einstáttað, tí øll tilveran hjá tær snýr seg snøgt sagt um fótbólt.

– Og so skal heldur ikki gloymast, at tað er skjótt, at tingini skifta, tá tú livir soleiðis. Av og á kanst tú gerast noyddur at skifta felag, og tað er ikki bara sum at siga tað. Umframt at tú sjálvur skalt finna teg til rættis, so skal familjan eisini flytast við, so tú kanst ikki bara hugsa um teg sjálvan, sigur hann.

Og hetta hevði so eisini avgerandi ávirkanina, tá hann nú sat við samráðingarborðið í Hull. Adam Pearson, stjóri hjá Hull, vildi helst av øllum hava, at Julian helt fram í felagnum, og eisini venjarin, Jan Mølby, hevur givið til kennar, at hann framhaldandi vildi hava føroyska miðvallaran í hópinum.

Hinvegin, so dugdu teir eisini at síggja, at um leikarin ikki trívist uttan fyri vøllin, so kann vera torført at fáa sum mest burtur úr evnunum inni á vøllinum, og tískil varð avgerðin at enda, at Julian hevði frítt at fara.

### Eitt sindur av hvørjum

Tað var á heysti 1997, at Julian Johnsson gjørdi sáttmála við norska Kongsvinger, og gjørdist hann av teimum tá fleiri føroysku fótbóltsútisetunum.

Eftir tvey ár í Kongsvinger, sum seinna árið flutti niður í næstbestu norsku røðina, varð Julian undan kappingarárinum 200 seldur til Sogndal, sum vildi styrkja um hópin í roynd-unum at flyta upp í bestu deildina.

Hetta eydnaðist eisini, men hóast hann var ein av høvuðsmonnunum aftan fyri uppflytingina, so gekst illa hjá Julian at vinna sær fast pláss, tá liðið var flutt upp í bestu deildina, so tíðin var helst komin at leita sær aðrar vegir.

Áhugin fyri enskum fótbólti hevði altíð verið stórur, og sjálvur segði Julian eisini, at tað mundi vera dreymurin at royna seg í Onglandi. Ein følari frá Bradford gav tó einki úrslit, men við eitt kom Hull City við einum tilboði, og so var bara at taka av.

– Tað er kanska ikki Premier League, men eg sleppi so at royna meg í enskum fótbólti, og tað havi eg so møguleikan til nú, segði Julian, tá skiftið var veruleiki.

Og hóast hann nú hevur gjørt av at koma heimaftur, so dylir Julian ikki fyri, at hetta hava verið trý minnisrík ár.

– Eg havi fingið møguleikan at royna tilveruna sum yrkisleikari, og bara tað í sjálvum sær er ein stór uppliving. Og tað eru eisini nógvar einstakar løtur, sum eg altíð fari at minnast frá hesi tíðini.

– Eg havi millum annað skotið mál í ensku FA-Cup kappingini, har vit eisini spældu móti einum Premier League liðið, og sjálvt um tað at enda ikki gekst so væl hjá liðnum, so gekst tað væl persónliga hjá mær her í Hull, so so eingin skal ivast í, at tað er við gleði, at eg minnist aftur á hesa tíðina.

– Størsta upplivingin mundi tó vera, tá vit í 2000 spældu um uppflyting við Sogndal. Avgerandi dysturin varð leiktur á Ullevål leikvøllinum, og at vit so eisini vunnu dystin gjørdi hetta til nakað heilt serstakt.

### Var eingin ivi

Nú gongur leiðin so heimaftur, og sambært landsliðsleikaranum sjálvum, so var tað ongan tíð nakar ivi um, hvar hann skuldi spæla, tá hann kom aftur til Føroya.

– Eg var tvey ár í B36, áðrenn eg slapp til Noregs at spæla, og eg kendi meg altíð sera væl í felagnum. Ítróttarliga var hetta eisini ein hendingarík tíð, har eg búnaðist sera nógv sum leikari. Ikki minst tað árið, tá Tomislav Sivic var venjari hjá okkum, so alt í alt var eg ongan tíð í iva. Tað var stutt og greitt felagið, sum eg vildi spæla fyri, tá eg flutti heimaftur, sigur hann.

Og hóast hann mest sum av sær sjálvum fær status sum stjørnuleikari á liðnum, so tykist landsliðsmaðurin ikki at hava nakrar ætlanir um at taka tað meira róligt, nú hann er fluttur heimaftur.

– At eg ikki longur havi hug at liva sum yrkisleikari merkir ikki, at eg ikki havi hug at spæla fótbólt. Tvørtur ímóti, so gleði eg meg til nýggju avbjóðingina. Eg ætli mær at arbeiða hart fyri at gerast ein veruligur styrkur hjá B36, og vónandi kann eg tilføra miðvøllinum nakað av royndum. Hvussu langt hetta fer at røkka, er eitt sindur ilt at siga, men tað er so mín vón, at tað í øllum førum røkkur til heiðursmerki.

Og áðrenn vit heilt sleptu telefonhorninum, verður seinasti spurningurin settir til fótbóltsútisetan, sum nú hevur roynt seg enskum fótbólti. Hevur tilveran sum yrkisleikari kastað somikið nógv av sær, at Julian Johnsson er fíggjarliga tryggjaður framyvir.

– Nei, tað hevur hon avgjørt ikki. Sjálvandi havi eg fingið lagt nakað til síðis, men tað er á ongan hátt soleiðis, at eg bara kann leggja meg afturá. Nú fari eg aftur at ganga á Læraraskúlanum, og eftir tað verði eg eins og øll onnur noyddur at arbeiða, men tað er bara gott. Eg gleði meg í øllum førum til eisini at skula hugsa um annað enn bara fótbóltin, sigur Julian Johnsson at enda.

# Sjey-talið er goymt

**Í B36 eru tey sum vera man fegin um styrkin, sum felagið nú fær. Troyggjan hevur ligið klár í alt vár, og vónin er, at hon verður brúkt fyri fyrstu ferð sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tey, sum hava fylgt við 1. deildarliðnum hjá B36 í ár, hava kanska lagt til merkis, at enn hevur eingin leikari á liðnum havt nummar 7 á rygginum.

Nú Julian Johnsson er komin aftur til felagið er eisini eyðsæð, hví so hevur verið, og tað verður eisini váttað í B36, at troyggjan varð goymd.

– Ja, tað er rætt. Vit hava alla tíðina havt eina vón um, at tað skuldi eydnast okkum at fáa Julian aftur til felagið. Líka síðani hann fór til Noregs í '97 hava vit fylgt væl við, hvussu tað hevur gingist hjá honum. Vit hava glett okkum hansara vegna, tá tað hevur gingist væl, og yvirhøvur hevur sambandið alla tíðina verið hildið við líka.

Soleiðis sigur Kristian á Neystabø, formaður í B36, og hann leggur afturat, at tey sjálvandi eru fegin um styrkin, sum tey nú fáa.

– Tað eru vit sjálvandi sera væl nøgdir um. Ikki minst nú liðið er rættiliga hart rakt av skaðum, er tað hugaligt at fáa slíkan styrk, og vit ivast ikki í, at hetta fer at styrkja munandi um hópin seinnu hálvu av kappingarárinum.

Enn er tó ein dystur eftir av fyrru hálvu, og Kristian á Neystabø váttar eisini, at tað verður arbeitt fyri at fáa spæliloyvið hjá Julian klárt til tann dystin.

– Sum nevnt, so hava vit nógvar skaðar í løtuni. Hartil eru tríggir leikarar leikbannaðir til komandi dystin, so tað sigur seg sjálvt, at vit vóna at hava Julian tøkan til sunnudagin, men enn er tó alt ov tíðliga at siga nakað um hetta.




*Troyggjan við 7-talinum hevur í alt ár bíðað eftir einum eigara. Nú er hesin funnin, og spurningurin er bert, um troyggjan verður tikin í nýtslu longu sunnudagin*